**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Lærarastørv í fólkaskúlanum

Í fólkaskúlanum eru niðanfyri nevndu lærarastørv leys at søkja til setanar **1. august 2003.**

**Norðoya skúladømi I:** Klaksvíkar, Hvannasunds, Viðareiðis og Kunoyar kommunur
Klaksvíkar kommuna:
Skúlin við Ósánna 2 lærarar
Skúlan á Ziskatrøð 2 lærarar

Viðareiðis kommuna: 1 lærari
Umsøkjari, sum kann undirvísa í donskum, enskum og tónleiki, hevur fyrimun

**Norðoya skúladømi II:** Mikladals og Húsa kommunur
Mikladals kommuna: 1 einalærari

**Eysturoyar skúladømi I:** Fuglafjarðar, Gøtu og Leirvíkar kommunur
Fuglafjarðar kommuna: 3 lærarar
Umsøkjarar, sum kunnu undirvísa í alis-/evnafrøði og dreingjaítrótti, hava fyrimun

Gøtu kommuna: 1 lærari

**Eysturoyar skúladømi II:** Skála, Sjóvar, Oyndarfjarðar, Runavíkar og Nes kommunur
Runavíkar kommuna: 4 lærarar

Sjóvar kommuna: 2 lærarar
Til annað starvið hevur umsøkjari, sum kann undirvísa í alis-/evnafrøði, fyrimun

**Streymoyar skúladømi I:** Vestmanna og Kvívíkar kommunur
Vestmanna kommuna: 1 lærari
Umsøkjari, sum kann undirvísa í alis-/evnafrøði, rokning/støddfrøði, týskum og ítrótti, hevur fyrimun

**Streymoyar skúladømi II:** Hósvíkar, Hvalvíkar og Haldórsvíkar kommunur
Hósvíkar kommuna: 1 lærari
Umsøkjari, sum kann undirvísa í heimkunnleika, ítrótti og handarbeiði, hevur fyrimun

Hvalvíkar kommuna: 1 lærari

**Streymoyar skúladømi III:** Tórshavnar, Nólsoyar og Kirkjubøar kommunur
Tórshavnar kommuna:
*Eysturskúlin* 4 lærarar
*Venjingarskúlin* 3 lærarar

*Sankta Frans skúli* 2 lærarar
Til annað starvið hevur umsøkjari, sum kann undirvísa í tóinleiki, fyrimun

*Hoyvíkar skúli* 3 lærarar
Umsøkjarar, sum kunnu undirvísa í handverk/list og í náttúru/tøkni, hava fyrimun

*Argja skúli* 2 lærarar
*Kollafjarðar skúli* 2 lærarar

Velbastaðar kommuna: 1 lærari

**Vága skúldømi:** Miðvágs-Sandavágs, Sørvágs og Bíggjar kommunur
Miðvágs-Sandavágs kommunur: 2 lærari
Til annað starvið hevur umsøkjari, sum kann undirvísa í enskum og týskum í framhaldsdeildini, fyrimun

Sørvágs kommuna: 1 lærari

**Sandoyar skúladømi:** Húsavík, Sands, Skálavíkar, Skopunar kommunur og Sandoyar Meginskúli
*Sandoyar Meginskúli:* 1 lærari

**Suðuroyar skúladømi I:** Hvalbiar og Tvøroyrar kommunur
Tvøroyrar kommuna: 2 lærarar

**Suðuroya skúladømi II:** Hovs, Porkeris, Sumbiar, Fámjins og Vágs kommunur
Vágs kommuna: 1 lærari

Øll størvini eru føst størv við fullum tímatali.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving.
Læraralesandi, ið taka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini. Seinastu støðumet verða send saman við umsóknini.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum, Fólkaskúladeildini, við starvsstaði í nevnda skúladømi og við fyribils tænastu í nevnda skúla/nevndu skúlum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum sett/settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 - 27.4, og einalærarastørvinini verða lønt í lønarflokkunum 19.4 - 30.2, sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal verða send **Mentamálaráðnum, Hoyvíksvegur 72, postrúm 3279, 110 Tórshavn**, skjótast til ber og soleiðis, at hon er Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 14. mai 2003**. Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av próvbrævi og møguligum viðmælum.

Teir umsøkjarar, ið søkja størv í fleiri skúlum, skulu skriva eina umsókn til hvørt starv, ið søkt verður.

Umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Tórshavn, 29. apríl 2003
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 - Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 - Fax 355055 - e-postur: MMR@MMR.fo

# Heimarøktin Sandoyar øki

## søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum

Heimarøktin Sandoyar øki er í støðugari menning. Vit hava tí brúk fyri sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum til fast starv, seturnarbrøk eftir avtalu.
Heimarøktin Sandoyar øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims- og sambýlis røkt og rakstur er samskipað. Vit fara í næstum í gongd við samdøgursrøkt og at menna um umstøðurnar hjá teim minnisveiku.

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum:**
- við hollum røktarfakligum royndum
- sum hava hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- sum hava hug og hegni at undirvísa og vegleiða starvsfelagaðar, lesandi og næmingar.
- sum hava hug at starvast bæði inni á bústovnum og úti í heimarøktini.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt.
- eitt starv við skiftandi avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Størvini verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran tlf. 361749/213890 ella varðaleiðaran tlf. 361791/228681.

Umsókn við avriti av autorisatión, prógvum v.m. verður at senda til

**Heimarøktina**
Sandoyar øki
Àargarður 210 Sandur

Umsóknarfreist: 26.5.03

# Fuglafjarðar skúli

Søkt verður eftir lærarum til skúlaárið 2003/04.

- **3 størv** 26,5 tímar fyri lærarar í farloyvi og møguliga **1 starv** við niðursettum tímatali fyri lærarar, ið hava lækkað tímatal.
- **1 starv** 6 tímar at undirvísa í motorlæru.

Størvini, ið eru tíðaravmarkað skúlaárið 2003/04, verða sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 444087.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 26. mai kl. 16.00.**

**Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!**

**Fuglafjarðar skúlastýri**
v/ Una Næs
FO-530 Fuglafjørður